## The Dreams - Meðan vit bíða eftir MTV

Ungi punkbólkurin The Dreams verður millum bólkarnar á G! í ár. Bólkurin spældi á Jóansøkufestivalinum næst seinasta vikuskiftið, og stendur kanska frammanfyri einum altjóða gjøgnumbroti.

The Dreams vóru herfyri í London og kappaðust í kappingini "A cut" hjá MTV, har verður kappast um at sleppa at hita upp fyri amerikonsku songkvinnuna Anastaciu. Hóast royndir at yvitala teir, so vilja ungu punkararnir ikki bróta tann 80 síðir langa sáttmálan um tagnaðarskyldu, sum teir hava skrivað undir. So enn vita vit einki, um teir hava vunnið, eru komnir víðari í kappingini, ella eru smitaðir burtur úr.

**nud**

## Ein ovfarakát lama á Gøtusandi

Føroya ivaleyst festligasti bólkur Lama Sea, verður millum bólkarnar á G!. Listin á nøvnum, sum luttaka á G! veksir alsamt, og higartil eru 34 nøvn á honum. Milum hesið er nú eisini Lama Sea.

Lama Sea hava, síðan teir spældu seg í prix hálvfinaluna, veruliga gjørt vart við seg á føroyska tónleikapallinum. Herfyri luttóku teir á MjúS. Tað ber ikki til at tosa um spæligleði, talan er um ovfarakæti, tá Lama Sea fara á pallin, og hon smittar.

**nud**

## Gotiskur málmur á G!

Íslensku Stillbirth fara at spæla gotiskan tungmálm á G!, og siga sjálvir, at hetta er størsta konsert teir enn hava spælt. Stillbirth spæla sera tungan málmstónleik, og hava bólkar sum Dimmu Borgir, Iron Maiden og Cradle of Filth sum fyrimyndir.

Við sangara tveimum gittarleikarum, bassleikara, ljómborði og trummum ætlar bólkurin at rokka á G!

**nud**

TERNUBÚÐIN
Sundsvegur · tel 213804 ella 313804

FORKELA TEG SJÁLVAN

Tað nýggja baðið við:
• Dampbað
• Akupunkturstrálum
• Fótmassasju
• Vanligari brúsu
• Útvarp
• Telefon
... og nógv meira

kann siggjast



# Kringvarp Føroya søkir lærlingar til sjónvarpið

Søkt verur eftir tveimum lærlingum til útbúgvingina sum miðlatøknimekanikarar at byrja 1. september. Læran umfatar alt tekniskt arbeiði innan sjónvarp, m.a. upptøkur, redigering og viðlíkahald av útgerð. Útbúgvingin tekur 4½ ár. Av hesum eru 55 vikur skúlagongd í Danmark.

Førleikakrøv:

- "Grundforløbet teknologi og kommunikation inden for den kreative mediefamilie", á góðkendum skúla
- ella HH-, HF- ella studentsprógv.

Royndir við og áhugi fyri sjónvarpsmiðlinum eru fyrimunir. Umsóknir við viðmælum og prógvum skulu sendast til:

Kringvarp Føroya
Norðara Ringvegi
Postboks 1299
110 Tórshavn
Merkt: MTM–lærlingar

Nærri upplýsingar kunnu fáast við venda sær til J. Herluf Sørensen – telefon 347742 – tpost: jhs@svf.fo.

Umsóknir skulu vera kringvarpinum í hendi í seinasta lagi fríggjadagin 15. juli 2005, kl. 13.00. Umsøkjarar mugu vera tøkir til praktiska roynd leygardagin tann 23. juli.



Í LÆRU SUM SØLUMAÐUR?

Valdemar Lützen byggibúð á Skálatrøð, søkir eftir lærlingi, at arbeiða í byggibúðini. Viðkomandi kemur at fáast við at avgreiða kundar okkara innan: Amboð & maskinur, Ruko lásatænastu, urtagarðsútbúnað og annað innan byggimarknað.

Førleikakrøv:
Vit ynskja ein persón, ið dámar væl at fáast við fólk. Ein positivan og íðnan persón, ið ikki er bangin fyri at fáa ymiskar arbeiðsuppgávur og taka hond í. Til dømis at arbeiða sum lásasmiður, uttanfyri fyritøkuna. Viðkomandi skal verða rekin og møta væl til ásettu arbeiðstíðirnar.
Fyrimunir eru um viðkomandi hevur nakað av kunnleika til teldur sum heild og lítla koyrikortið til bil, umframt FHS prógv.

Vit kunnu bjóða:
Eitt sera gott og spennandi arbeiðsumhvørvi niðri við sjóvarmálan "har sólin og sjógvurin møtast".

Ein útbúgving sum sølumaður hevur mangan vist seg at menn eru komnir langt við seinni í lívinum. Tað at arbeiðsuppgávurnar eru ymiskar, ger at ein ikki fær seg at arbeiða við tí sama hvønn dag.

Umsókn kann sendast til:
Valdemar Lützen byggibúð
Skálatrøð 14
Postboks 20
110 Tórshavn
Att.: Høgni Lützen

Fyrispurningar skulu rættast til: Høgna Lützen – Telefon 31 10 20

VALDEMAR LÜTZEN BYGGIBÚÐ · *HAR SÓLIN OG SJÓGVURIN MØTAST* · TEL 31 79 20

BILASØLAN ER OPIN LEYGARDAGIN KL. 10-18

TEL 35 73 00 ELLA 21 73 00 · WWW.BILFRIDKAN.FO
LANDSINS LAGALIGASTA BRÚKTBILAFÍGGING

Bilfríðkan á Hjalla